DAGSINS MEINING

Hovs-Øravíkartunnil hægstu raðfesting!

Vitjan tingmanna í Suðuroy hevur sett Suðuroynna á dagskránna, og greitt er, at nógv mál í Suðuroy liggja á láni. Av teimum mongu málunum er ein tunnil millum Hov og Øravík hitt mest átrokandi málið. Vegurin um Hovsegg er sera vandamikil, og tað er bert eitt Guds undur, at stórskaði ikki longu er hendur á hesum vegastrekki. Ferðslan um Hovsegg er stór, og nøkur teirra, ið har ferðast dagliga eru tvungin at fara hetta strekkið. Vit hugsa um næmingarnar á miðnámskúlanum í Vági. Hvør hevur moralsku og menniskjaligu ábyrgdina um ein stórskaði hendir her? Svarið kann bert verða: her má eingin skaði henda!

Gamalt er, at best er at binda um heilan fingur. Hetta merkir, at betri er at vera fyrivarin enn eftirsnarin. Betur er at fyrbyrgja enn at lekja. Tá vegurin millum Hov og Øravík var gjørdur í síni tíð, var eingin, sum hugsaði um tunnlar millum bygdir í Føroyum. Hvørki tøknin ella búskapurin vóru til slíkar loysnir. Hartil kom, at ferðsaln var ein heilt øðrvísi, enn hon er í dag. Bilarnir vóru færri og lættari – privatbilisman var ókend, ei heldur nakar droymdi um hana. Men alt hetta er broytt, og Suðuroy er at kalla eitt øki ella ein skipan. Fleiri skúlar og almennir stovnar dekka alt økið, og borgararnir eiga at kunna koma trygt til hesar stovnar á summri sum á vetri. Ein tunnil millum Hov og Øravík eigur tí at standa ovast á íløgulistanum í komandi figgjarlóg, og ger hon tað ikki, er hetta prógv um stórt ábyrgdarloysi og um ramastu líkasælu mótvegis medborgarum okkara í Suðuroy.

Vit kundu nevnt onnur átrokandi mál t.d. spurningin um trolingina vestan fyri Suðuroynna, sum tingmaðurin Henrik Old tíbetur nú hevur reist á tingi, útbyggingina av skúlunum, leiklutin hjá sjúkrahúsinum, lagnan hjá djúphavnini í Vági, vanlukkuna innan alingina og mangt, mangt annað. Alt hetta krevur, at tingmenninir í oynni ansa væl eftir og fylgja væl við, at teir alla tíðina skora á og ansa eftir at henda forfjónaða oyggin ikki dettur burtur ímillum.

Men fyrst og fremst mugu suðringar sjálvir taka ábyrgdina av egnari lagnu og av at menna oynna. Hetta gerst ikki við mekaniskt at flyta almennar stovnar til Suðuroyar. Tað gevur onga menning í sjálvum sær. Menningin, tann ektaða og varandi økismenningin kemur fyrst og fremst við at nøta vit og skil og tann dugnaskap, tað árræði og tey skapandi evni, ið altíð hava eyðkent sjarmerandi og lívsfriska fólkið fyri sunnan.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Kærleiki Kristusar ella fordómsfull humanisma?

Jenis av Rana



Álvarsligasta, ið fram er borið á skrift á føroyskum seinastu mongu árini, er stutta greinin, vit lósu í bleðunum herfyri undir yvirskriftini "Yvirlýsing". Ikki so nógv vegna tann partin av innihaldinum, sum viðvíkur teimum sokallaðu samkyndu, men vegna tað opinlýsu uppgerð við grundarlagið, ið samfelag okkara higartil hevur hvílt trygt á.

Kristna grundarlagið

Tó ymisk í mongum, so man felagsnevnarin fyri flestu føroyingar vera kristna trúgvin. Hjá summum meira opin og sjónlig, hjá øðrum meira stillfør, men hjá flestu trygdin í dagliga degnum og álitið at leita til, tá annað svíkur.

Jú, meir enn so hoyrast røddir, ið royna at gera upp við hetta, men tær hava verið fáar og spjaddar.

Fordómsfull humanisma

Í andsøgn til kærleika Kristusar, ið elskar og tekur ímóti okkum hvørs brek og veikleikar, hava vit humanismuna, hvørs grundhugsjón er at seta skapningin – menniskjað – í sentrum heldur enn Skaparan. Tí sigja vit m. a. altíð humanismuna verða framhevjaða av teimum, sum føra seg fram sum mótstøðumenn teirra kristnu.

Líkheitin millum orðini humanur og humanisma gevur óiva humanismuni eitt good-will, ið henni als ikki tilkemur, tí í botn og grund er hon beinleiðis vandamikil, júst tí hon, sum í omanfyrinevndu grein, verður sett ístaðin fyri kristindómin. Bíblian boðar hinvegin, hvussu svikaligt tað er at seta álit sítt á menniskjað, og munnu ikki flestu okkara kenna hetta, í hvussu so er frá okkum sjálvum. Heilt frá skapanardøgunum og upp til dagin í dag, har dagliga millum 50 og 60 kríggj eru í gongd, boðar veruleikin okkum júst hetta, at tað sjáldan er tað góða í menniskjanum, sum vinnur. Tí framdi Gud frelsuætlanina, sendi Son sín í deyðan okkara vegna, so vit í áliti á Hann, og ikki okkum sjálvi, kunnu verða bjargað.

Ein hóttandi yvirlýsing

Úr yvirlýsingini endurgevi eg:

... "hetta kann als ikki góðtakast í einum siviliseraðum og demokratiskum samfelag, sum byggir á humanistiska siðvenju"....

....."tí mótmæla vit harðliga, at ávísar átrúnaðarligar skriftir og tulkingar skulu vera grundarlag undir landsins lóggávu"...

Ikki eitt orð í yvirlýsingini um Føroyar sum eitt kristið samfelag, nei, vit lesa um, at samfelagið byggir á humanistiska siðvenju, og at man ikki ynskir, at ávísar átrúnaðarligar skriftir og tulkingar skulu vera grundarlag undir landsins lóggávu.

Eg fái meg ikki at trúgva, at summi teirra, ið sigast hava skrivað undir, hava lisið orðini, áðrenn tey nýttu hond sína, men tað fáa vit kanska høvi til at hoyra frá teimum sjálvum, um so er. Tí hesi brotini eru, sum eg nevndi í byrjanini, álvarsligasta hóttanin, sum signaða føðiland okkara hevur verið fyri í minniligar tíðir.

Áheitan um at biðja

Tí hendan inniliga áheitan á allar føroyingar, sum dagliga seta álit sítt á Skapara himins og jarðar og hvíla í ørmum Hansara: Biðið fyri landi okkara! Lat Gud og Faðir okkara, sum gav alt fyri okkum, merkja, at vit seta álit á Hann, hjálp og umsorgan Hansara og einki annað. Og latið okkum biðja fyri teimum, sum verða svikin vegna tað, at tey seta álitið á menniskju, at tey mugu leita aftur til Faðirin fyri har at fáa veruligu hjálpina.

Viðvíkjandi teimum kynsvillu

Tú hjálpir ikki einum neyðstøddum, t.d einum, ið hevur rent seg fastan í bjørgunum ella einum, ið er um at drukna, við at rópa á hann, at hann ikki skal kenna seg fordømdan. Gert tú tað, ístaðin fyri at rætta honum hondina ella línuna, so svíkur tú hann. Bert við at bjarga honum úr neyðstøduni, veitir tú honum hjálp. Alt annað er tómt tos, miskunnar- og skilaloysi.

Teimum kynsvillu tørvar hjálp, somu hjálpina, ið vit øll tørva í øllum lívsins viðurskiftum. Søgan og dagligdagurin prógvar, hvussu veik vit eru, hvussu okkum aftur og aftur tørvar umsorgan, hjálp og verju himmalska Faðirs okkara. Tað kann vera við so mongum, men altið er Hann har, tá vit kalla á Hann, Hann fyrigevur okkum og hjálpir.

Túsundir av kynsvillum hava upplivað frælsið, sum Faðirin veitir teimum, ið leita til Hansara. Mong teirra eru í dag virkin í at hjálpa øðrum, sum enn eru bundin. Øll siga frá tí tyngjandi trælalívi, tey livdu, og frá tí frælsi, tey funnu.

Boðanin í samkomum okkara

Í øll tey ár eg havi havt mína gongd í samkomur og millum trúgvandi, havi eg ongantíð hoyrt talur ella boðskapir, ið eru vend móti øðrum enn syndini og honum, ið stendur aftanfyri hesa, t.e. djevulin. Boðskapurin er og hevur verið hin sami, ein kærleikans boðskapur til allar syndarar, øll neyðstødd- herímillum eisini tey sokallaðu samkyndu. Ongantíð minnist eg at hava hoyrt prædiku móti menniskjum, heldur ikki fyrrnevndu.

Ágavert hevði verið at sæð dømir og ítøkilig prógv frá teimum, ið føra tað mótsatta fram. Prógv heldur enn pástandir, tí grundleysir pástandir boða bert frá fordómum- og slíkir hoyra ikki heima í einum upplýstum samfelagi sum tí føroyska. At so mong teirra, sum í hesum døgum tykjast kappast um at føra fram grundleysar pástandir, bera lærd heiti ger bert skommina størri og tænir ongum, allarminst teimum, ið so sáran tørva hjálpandi hond heldur enn mjúk orð, ið lata teg óhjálpnan og neyðstaddan eftir.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari: Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Tey samkyndu - Ein hóttan?

Ragnar S. Olsen
660 Søldarfjørður



Tað er nógv skrivað og sagt um rættin til at vera samkyndur. Seinast við allari forsíðuni og tveimum opnum í einum av okkara dagbløðum.

Í seinastuni hevur kjakið vundið upp á seg, og eg klári ikki longur at lata vera við at leggja uppí.

Fordøming?!?

Spurningurin um fordøming tykist verða tann, ið nívir mest. Eg vil siga heilt greitt, at eg upp á ongan máta fordømi tey samkyndu, men eg taki ikki undir við samkynda liviháttinum, og fari ongantíð at gera tað. Vit eiga at elska okkara næsta, men tað er ikki tað sama sum at siga at vit elska alt tað, ið næsti okkara ger.

Í 3. Mósebók kap. 18 og 20 verður sagt, at tað er deyðarevsing fyri samkynd. Tað var galdandi tá. Í nýggja testamenti lesa vit t.d. um kvinnuna, ið var tikin í hori; hon skuldi steinast til deyða (tað kravdi lógin jú), men Jesus sjálvur segði: Heldur ikki eg dømi teg, far avstað og **synda ikki longur**. Legg merki til boðini, hon fekk fyrigeving ella henni varð víst náði, men gloym ikki, at hon skuldi ikki halda áfram við tí hon annars skuldi dømast fyri.

Vit sigga her, at nú var náðin komin í staðin fyri lógina.

Bíblian sigur eisini beinleiðis í Rom. kap. 6, at vit skulu ikki halda áfram í syndini, fyri á tann hátt fáa enn større náði. Minni enn so! Tá vit sigga at vit hava fingið fyrigeving, vilja vit ikki, við vilja, halda áfram við somu synd. Tað er at halda tann, ið fyrigevur, fyri tað turra spott.

Tá náðitíðin nú er komin, skuldi ein trú, at eingi boð eru um at halda nakra lóg longur. Nei, tvørturímóti verður stórur dentur lagdur á at liva eitt reint lýtaleyst lív. Eisini verður í nýggja testamenti sagt nakað um samkynd, og fyri tað eisini um at dríva hor. Í Rom. kap. 1 og 1. Kor. kap. 9, verður harðliga funnist at hesum. Tað verður kallað fyri nakað viðurstyggiligt. Tað verður enntá farið so langt, at funnist verður eisini at teimum, ið halda við teimum Rom. kap. 1.32.

Samanumtikið vil eg siga, at eg fordømi ongan, men eg kann eisini viðganga, at eg fordømi samkyndan livihátt.

Vernd av minnilutum

Tey samkyndu vilja vera við, at tey eru ein minniluti, ið hava ein demokratiskan rætt til at fáa viðurkenning, men hava tað ikki.

Tey vildu eisini føra fram, at tey fingu eina dygga undirtøku í bløðunum herfyri, tá 323 fólk í og uttan fyri Føroyar høvdu sett navn sítt undir eina yvirlýsing til frama fyri skrásettum paralag fyri tey samkyndu.

Eg eri fullvísur í, at um farið var at savna undirskriftir ímóti skrásettum paralag til samkynd, hevði undirtøkan verðið 10-tals ferðir større.

Og tá kunnu vit siga, at tað er ikki ein demokratiskur rættur longur, tí tað er júst tað, sum er ein partur av demokratinum, at meirlutin vinnur.

So kann spurningurin, um tað er moralskt rætt at verja ein minniluta sum hendan. Til tað vil eg svara, at tað vildi júst verið ómoralskt, tí talan er um beinleiðis ómoral.

Tey siga eisini, at tey kenna seg at verða forfylgd.

Vit kunnu spyrja hví? Jú tey hava ein atburð, ið beinleiðis verður nevnt sum lógarbrot/synd í Bíbliuni. Tey hava helst ringa samvitsku, og ístaðin fyri at taka annað skinn um bak, royna tey at fáa henda trend legaliseraðan. Eisini tí at tað nú er IN at vera samkyndur.

Tey vísa á, at í øðrum londum er hetta legaliserað við tað, at tað er revsivert at hava at fólkið vegna politiska, átrúnaðarliga ella kynsliga áskoðan.

Men hvat er tað sum er hent í hesum málið.

Tá man hevur fingið tað kynsliga við í omanfyrinevnda bólk, er man á veg inn á ein álvarsaman glíðiskala. Mær kemur til hugs sangin hjá Rasmus Effersøe, har seyðafylgi- fylgdi eftir slóðaranum, og fór fyri bakka.

Hvar er markið fyri kynsliga áskoðan? Nær fer man út av bakkanum?

Verður tað næsta, at tey pedofilu skulu hava almenna viðurkenning?

Skulu tey, ið hava kynsligan umgang við djór kunna fara í skrásett parlag við t.d. ein hund?

Eg meini so við, hvat verður tað næsta? Nær og hvar skal nakað mark setast?

Avleiðingar

Um vit taka málið í álvara, so kunnu vit hyggja eftir hvat hendir í grannalondum okkara. Í Svoríki verður bannað at prenta tilfar, ið revsar minnilutar, herundir samkynd. Tað hevur eisini við sær at Bíblian ikki kann prentast longur.

Vit kunnu nú spyrja, hvat er meira vert at verja, er tað ein avsporaður minniluti ella skrivifrælsið í síni heild.

Vit siggja her, at tað er tað heilt grundleggjandi í samfelagsskipan okkara, sum er til umrøðu. Vilja vit halda fast við okkara kristna siðarv, ella er tað júst meiningin at fáa hann burtur!

Siðalæra og átrúðnaður

Hallur G. Thorsteinsson
BA, stud.mag., RUC

I hvønn mun hanga siðalæra og átrúðnaður saman? Hetta er ein fundamentalur spurningur, sum tykist serliga viðkomandi í samanhangi við tað orðaskiftið, sum valið av fýra limun í Siðseinevndini hevur ført við sær.

Valið av teimun nýggju limunum í Siðseinevndina hevur skapt stóran ans millum føroyingar flest hesa síðstu tíðina. Bløðini hava verið á tremur við viðmerkingum - bæði fyri og ímóti. Landsstýrismaðurin við heilsumálum, Bill Justinussen, stendur við sítt, og løgmaður vil helst ikki gera meira við málið. Við øðrum orðum kunnu vit ásanna, at enn ein avgerandi samfelagsspurningur skal tigast í hel.

Eg vil ikki bera orðaskiftið inn á persónligu viðurskiftið teirra útvaldu, men tó seta spurnartekin við tað tilvildarliga faktum, at allir hesir limir hava samband við meira ella minni fragmenteraðar samkomur. Hetta tykist at verða tann reyði tráðurin, sum fær limirnar til at hangja saman sum eina heild, og tí tykist tað nærmast órimiligt at pástanda, at hetta ikki hevur spælt ein avgerandi leiklut í valinum av limunum. Í hvønn mun hetta kann sigast at vera ein demokratiskur (les etiskur) framferðaháttur, tá talan er um eina nevnd, sum helst skuldi kunna avspeglað føroysku fólkasamansetingina, kann mann kjakast um, men ikki her.

Tað, eg fyrst og fremst vil seta orð á, er sambandið millum siðalæru og átrúnað. Í hesum sambandi vil eg royna at grundgeva fyri, hví eg ikki haldi, at hesi fyribrigdi eru tengd av hvørjum ørðum, og kanska heldur tvørturímóti.

Átrúðnaligir úrmælingar

Tað er vanligur hugsannarháttur, at átrúðnaður og siðalæra hanga saman. Gudfrøðingar verða ofta hildnir at verða serfrøðingar á høgum stigi, hvat siðalæru viðkemur. Hetta er ongin løgin uppfatan, og tað eru í øllum førum tvær orsøkir til tess. Fyri tað fyrsta eru teir almenn umboð fyri ta kristnu læruna - og tí talurør fyri gomlu moralsku fyriskriftirnar, sum eru at finna í bæði Gamla- og Nýggja Testamenti. Harafturat er teirra leiklutur sum moralskt talurør djúpt rótfestur í gomlum (sið)søguligum viðurskiftum

Men sum tíðin er liðin, og alternativ til fólkakirkjuna eru vaksin fram, hava prætikantar av øðrum slagi eisini tikið ein bita av moralsku lagkøkuni, og hava tí sum kunnugt er, eisini beinleiðis samskifti við hægri instansar, sum kunnu geva boð um, hvat er rangt og hvat er rætt.

Kristin siðalæra

Innan kristna siðalæru eru tað serliga tveir hugsannarhættir, sum hava verið frammi: annar kallast *The Divine Command Theory* (DCT), og hin *The Theory of Natural Law* (TNL)

Tað skal sigast, at tann sokallaða DCT ikki hevur nógvar fortalarar í fakligum samanhangi, og eg skal í stuttum greiða frá hví.

Kjarnan í DCT er, at vit mugu liva eftir teimun reglum sum Gud hevur ásett okkum. Tað vil siga, at tað Gud krevur av okkum er moralskt rætt, og tað hann forbjóðar er rangt. Ein av fyrimununum kann tykjast at verða, at vit sum menniskju ikku nýtast at keglast um etisk viðurskifti, og reint visindaliga nýtist okkum ikki at spekulera um objektivitet.

Sum eg sipaði til omanfyri, eru tað tó nakrir trupulleikar við hesum ástøði. Fyri tað fyrsta er tað ringt at góðtaka hugsannarháttin, um tú ikki er trúgvandi. Fyri tað næsta kann mann seta spurningin: er boðið rætt tí Gud krevur tað, ella krevur Gud at vit yvirhalda boðið tí tað er rætt í sær sjálvum? Hesin spurningur hevur megi til at petta ástøðið sundur.

Um tú velur at svara spurninginum við at siga, at boði er rætt tí Gud krevur tað, merkir tað, at Gud eisini kundi kravt tað mótsatta enn tað, hann gjørdi - tí boðið er jú bara rætt, tí Gud krevur tað. Hetta viðførir meiningsloysi, og tí verður hetta svarið sjálvdan valt

Vit kunnu eisini velja at svara, at Gud krevur, at vit yvirhalda boðið, tí *tað* er rætt. Av tí at Gud er algóður, velur hann við vísdómi, og tí skulu vit yvirhalda boð hansara. Men hetta svarið viðførir eisini trupulleikar: við at siga, at Gud hevur valt boðið, tí tað er rætt, so viðganga vit samstundis, at tað finnist nakað, sum er rangt og rætt - óheft av Gudi. Hetta merkir, at vit ikki kunnu fáa endaligt svar um hví, og eru yvirlatin til trúnna.

TNL-ástøðið, sum mann oftast møtir í etiskum kjaki (td. alment viðurkenda siðalæran hjá katólsku kirkjuni), er meiri sannførandi, men sjálvur haldi eg ikki at tað er fullkomiliga vatntætt. Orsøkina til hetta skal eg koma inn á niðanfyri.

Grundleggjandi byggir ástøðið á ta hugsan, at heimurin er skipaður á skynsamiligan hátt, og at øll fyribrigdi tí hava eina orsøk og eitt endamál (telos). Hetta er ein gamal hugsannarháttur, sum stavar frá greskari heimspeki.

Tær 'náttúrulógir' sum eru tengdar at hesari uppfatan, fortelja okkum ikki bara hvussu heimurin er, men eisini hvussu hann eigur at verða (hetta kallast innan heimspekina den naturalistiske fejlslutning). Hetta hevur stóran týðning fyri, hvussu vit meta um moralskt rætt og rangt: atburður kann verða natúrligur (rættur) ella ónatúrligur (rangur).

Tað síðsta, oftast dikteraða, elementi í TNL er, at vit, við at nýta skilsemi, sjálvi kunnu finna fram til besta mátan at bera okkum at. Tvs. at Gud hevur givið okkum skilsemi, so vit m.a. kunnu skilja millum rangt og rætt. Hetta kann tykjast sum ein langt meiri sannlíkur hugsannarháttur enn DCT, har tað góða og ónda ikki kundi skiljast rationelt. Við TNL hava vit harafturímóti fatur á einari tankagongd, har teir moralsku trupulleikarnir eru hálaðir niður á jørðina, og menniskja hevur sjálvt fingið ein avgerandi leiklut.

Sum eg við eitt sindur av speiseminum peikaði á omanfyri, so kann ein av fyriminunum við DCT sýnast at vera, at vit sum menniskju ikku nýtast at keglast um etisk viðurskifti. Hetta kann mann ikki siga um TNL, sjálvt um hetta ástøði í síðsta enda byggir á menniskjans skynsemi. Skynsemi vísir seg sjótt ikki at vera ein konstantur, men heldur eitt tilvildarligt fyribrigdi, sum ávirkast av okkara persónligu meiningum.

Frávíkjan ein synd

Av tí at tankin um tað náttúrliga og tað ónáttúrliga er ein av grundsteinunum í TNL, hevur henda læran ofta verði nýtt til at fordøma frávíkjarar av ymiskum slagi. Tann katólska fordømingin av samkyntum er eitt dømi uppá júst hetta. Alt hevur sum sagt eitt náttúrligt endamál, og tí er kynsligt virksemi, har endamálið ikki er produktivt, rætt og slætt ikki náttúrligt, og tí skeivt - og harvið er fordømingin av samkyntum fullgjørd.

Hetta er í mínari verð, eitt gott dømi um, hvussu eitt ástøði sum í síðsta enda eigur at byggja á skynsemi, kann nýtast sum ein irrationellur maktfaktorur, bæði í átrúnarligum og politiskum samanhangi.

Orsøkin er, at vit øll hava eina rúgvu av meiningum og hugsanum, sum vit taka við okkum, tá vit skulu taka støðu til ymisk viðurskifti. Hesar meiningar kunnu tykjast at verða fullkomliga rættar fyri tann, ið eigur tær, men fyri ein annan persón kunnu tær tykjast óskiljandi, av tí at tær eru sprotnar úr einari heilt aðrari tankagongd, enn hesin persónur kann taka undir við.

Síðsemi í 2002

Av tí at heimurin útviklar seg, við tí ferð hann ger, verða vit noydd til at laga okkara hugtøk eftir teimun umstøðum, ið eru galdandi. Hetta merkir, at vit verða noydd til at vera opin og góðtaka, at tey orð, sum vóru hóskandi fyrr, ikki eru tað í dag.

Tað er í hesum samanhangi, at átrúðnaður kann, og eg meini kann, verða ein forðing á etiska økinum. Átrúnaður er í stóran mun konservativur av tí, at hann hevur uppruna í einari gamlari heimsuppfatan, har m.a. rangt og rætt er høgt inn í stein. Tað er talan um ein avbyrdan alheim, har sannleiki verður kanaliseraður gjøgnum Orðið. Tí kann mann taka patent uppá Sannleikan, og hetta ger tað ringt at flyta mørk, tá mótstøðumaðurin stendur við Bíbliu í hond. Og síðsemi snýr seg nevniliga eisini um at flyta mørk, men á ein síðiligan og skynsaman hátt.

Hetta er høvuðsorsøkin til, at eg meini, at tað skal vera pláss fyri fólki, sum ikki hevur tilknýti til ymiskar samkomur í einari nevnd sum Síðseinevndin. Við hesum er ikki sagt, at tað ikki eisini skal verða pláss fyri fólki við átrúnarligari sannføring í hesari nevnd. Men tað er umráðandi, at vit menna síðsemisorðaskiftið í tráð við teir realitetirnar, sum eru galdandi í einum nýmótans samfelagi ár 2002, og ikki eftir persónligari sannføring, sum botnar í 2000 ára gomlum síðaarvi.